# Heðin handaði Astu blómur



Í samband við, at Kioskin hjá Astu í gongugøtuni í Havn verður 70 ár á ólavsøku, handaði borgarstjórin í Tórshavnar kommunu, Heðin Mortensen, Astu eitt blómutyssi fríggjadagin fyri døgurða.

- Vit eru grannar hjá kioskini, og Asta er ein býarmynd. Kioskin er eisini ein partur av samleikanum í býnum, og tí valdu vit at handa henni eitt blómutyssi fyri drúgva tænastu, sigur borgarstjórin í Tórshavnar kommunu, Heðin Mortensen.

Tað var í 1935, at reyða kioskin við Havnará varð sett upp. Asta hevur arbeitt í kioskini, síðan hon var 18 ár.

# Eitt skot og annað

**– Vit spældu har úti við Skansan, og so kom mamman og segði, at nú fóru menninir at spreingja. So máttu vit bara fara eitt sindur burturfrá, siga fimm gentur úr Havn**

BARNAFRÍTÍÐ



*Børnunum dáma væl at spæla á Skansanum, serliga við tær stóru kanónirnar – f.v. Durita Heinesen (9 ár), Simona Heinesen (14), Gunnvá Gunnarsdóttir Jacobsen (9), Allan Mouritsen (10), Helena Gunnarsdóttir Jacobsen (12) og Rannvá Djurhuus Carlsen (10)*

*Myndeigari: Bjørg Djurhuus*

Týsdagin upplivdu hesar fimm genturnar nakað, sum tær neyvan munnu hava sæð so ofta: At nakrir menn sprongdu niðri í fjøruni har Yviri við Strond.

Hesar fimm genturnar og ein drongur spældu har í nánd, tá nakrir menn, sum arbeiða við at leggja ein kloakk, fyrireikaðu seg til eitt skot.

Mamma ta einu gentuna kom oman til børnini, og bað tey fara eitt sindur burturfrá.

Á henda hátt kundu tey síggja tað, sum fór fram, samstundis sum tey vóru uttanfyri sjálvt arbeiðsøkið, um okkurt ikki gekk sum tað skuldi.

Fyrst blástu menninir tríggjar ferðir í eitt horn, og síðani var sjálv spreingingin, sum ljóðaði nokkso har í oyrunum á børnunum. Eftir ta væleydnaðu spreingingina blástu teir aftur í hornið, fyri at vísa at nú var vandin av.

Og so høvdu børnini upplivað, hvussu ein ber seg at við at spreinga fyri eini kloakk Yviri við Strond í Havn.

Aftaná fóru børnini niðan á sjálvan Skansan at spæla. Har dáma teimum serliga væl at spæla rundan um tær stóru kanónirnar, sum har eru.

Tíbetur loystu tær einki skot av!

## Sanghefti er komið




Sangirnir til Miðnáttarsangin á ólavsøku eru flest allir fólkaogn, men tað er nú lættari at syngja við, tá man hevur sanghefti. Tí hevur Tórshavnar kommuna aftur í ár prentað sanghefti, sum fáast ókeypis í Snarskivuni og á Kunningarstovuni. Harumframt fáast heftini á Vaglinum áðrenn og meðan sungið verður.

## Nýtt Frøði útkomið

Í Frøði nummar 1 fyri 2005 eru greinar um valskipanir, tsunami, kolvetni í undirgrundini, heimadoktarar, Mølheyggjar á Sandi, staraloppuna og eitt nýtt met, sum hitin á Landgrunninum setti í 2003.

Í greinini »Val, val, val – nú tingið mannast skal« greiðir hagfrøðingurin Petur Zachariasen frá ymiskum valskipanum, og hann viðger eisini nakrar vansar við galdandi løgtingsvalskipan. Tað verður gjørt við fleiri áhugaverdum taldømum, og okkurt boð verður givið um, hvussu valskipanin kundi verið broytt, so tingmannabýtið passaði betur við valúrslitini.

Annan jóladag í fjør rakti ein hervilig tsunami stóran part av londunum kring Indiahav, og síðani hevur nógv verið tosað um hetta fyribrigdi. Ein av sjálvsøgdu spurningunum í hesum sambandi er, um ein slík alda kann raka okkum. Henda spurning viðger Lis Mortensen á Jarðfrøðisavninum í áhugaverdari grein. Hennara niðurstøða er, at ein tsunami kann raka Føroyar, tí Føroyar vórðu raktar av eini tsunami fyri 7.200 árum síðani, og tað kann tí sjálvandi henda aftur.

Í greinini »Kolvetni í undirgrundini« greiðir jarðalisfrøðingurin Heri Ziska frá, hvørjar treytir skulu uppfyllast, um olja skal finnast í undirgrundini. Millum treytirnar eru, at kolvetni er framleitt, at goymslugrýti var til staðar, at fellur vóru til staðar, og at alt hetta var til staðar til røttu tíð. Hetta eru týdningarmiklastu faktorarnir, sum teir, sum leita eftir olju í føroysku undirgrundini, kanna fyri tíðina. Við greiðum myndum og einfaldum orðum megnar Heri at greiða frá hesum fyri flest okkara ógvuliga torskilta evni.

Elin Súsanna Jacobsen gav í fjør út eina søguritgerð, har hon viðger elstu partarnar av heilsuverkssøgu okkara og í greinini »Heimadoktara« greiðir hon frá hesum áhugaverda og ikki sørt gátuføra partinum av heilsuverkssøguni.

Í fleiri av teimum seinastu útgávunum av Frøði hava plantufrøðingar av Náttúrugripasavninum greitt frá áhugaverdum støðum í Føroyum. Hesu ferð greiðir Anna Maria Fosaa frá áhugaverda plantulívinum á Mølheyggjunum á Sandi, sum er eitt av fáu náttúruøkjum okkara, sum er friðað.

Dorete Bloch er komin til grein nummar fýra í greinarøðini um skaðadjór í Føroyum, og tað er staraloppan, sum er undir sjóneykuni hesuferð. Sum vant greiðir Dorete frá, hvussu vit kunnu fáa trupulleikar av staraloppuni, eins og nøkur góð ráð verða givin um, hvussu hon verður bast.

Í summar hava mong havt á orði, at tað hevur verið naka kalt í veðrinum. So var ikki við hitanum á sjónum innast á Landgrunninum, tí í 2003 máldi Fiskirannsóknarstovan hægsta sjóvarhitan nakrantíð á kanningarstøðini við Oyrargjógv. Hesum greiðir havfrøðingurin Karin Margreta Larsen frá í greinini »Hitin á Landgrunninum sett nýtt met«, har hon eisini viðgerð spurningin, um hetta er eitt tekin um nógv umrøddu alheims upphitingina.